**Kvæðatilfar - Nr: 15**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. – 9. flokk

**Uppgávuslag / heiti:** Persónslýsingar

**Vegleiðing:**

Fyri at liva seg inn í søguna hevur tað týdning, at næmingarnir ímynda sær persónarnar í kvæðnum. Endamálið við uppgávuni er at fáa næmingarnar at taka støðu til persónarnar og at gera teir livandi. Næmingarnir arbeiða ein og ein ella tveir og tveir saman.

Lærarin kann byrja tíman við at greiða frá, at hann hevur tosað við Sigmund:

”Tað var heilt ótrúligt at tosa við Sigmund, men men eg sigi einki um tað, uttan at tit siga mær, hvat tit vilja vita.”

So koma spurningarnir frá næmingunum:

Var hann stuttligur? Var hann keðiligur? Hvat mál tosaði hann? Var kann modernaður? Hvønn hárlit hevði hann? Var hann stórur? Var hann sterkur? Var hann fittur? Var hann klókur? Tosaði hann hart? Hvønn tosaði hann um (hvat var hann áhugaður í)? Hvussu gamal var hann? Var hann tvørur? Var hann cool? O.s.fr.

Lærarin skrivar allar spurningarnar uppá talvuna. Tá næmingarnir eru lidnir at spyrja, svarar lærarin spurningunum og grundar síni svar. T.d.:

Sigmundur var klókur. Vit minnast tá hann svaraði Beinir aftur í ørindi 8.

Ella lærarin sigur:

”Sigmund hevði einki skegg, tí hann var bara 9 ár”.

Eftir hetta biður lærarin næmingarnar taka eitt ark ella eitt hefti fram.

**Kvæðatilfar - Nr: 15**

Næmingarnir skulu nú gera sína metan av einum persóni í Brestis kvæðnum. Tað er ikki loyvt at skriva um tann sama persónin, sum lærarin hevur skrivað um. Næmingarnir skulu svara spurningunum,
sum eru á talvuni. Um næmingarnir hava hug, kunnu teir eisini tekna persónin.